UM ØKISFRIÐINGAR OG ONNUR TILTØK FYRI AT VERJA TOSKIN

Upprit til landsstýrismannin í fiskivinnumálum
Tórshavn, 3. mars 2010

1. INNGANGUR

Tá uppskotið um fiskidagar varð lagt fram á Ólavsøku 2009, boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann í kunngerðum ætlar at seta í verk ymiskar skipanir fyri at verja toskin (sí pkt. 2.1) -2.3) niðanfyri).

Á fundi í Fiskimálaráðnum 14.12.2009 varð gjørt av, at ein bólkur, mannaður við Jens Helgi Toftum, Fiskivinnustovan, Jóhan Simonsen, Fiskiveiðieftirlitið, og Petur Steingrund, Havstovan, skal taka sær av málinum og gera uppskot. Á sama fundi varð upplýst, at landsstýrismaðurin vil hava uppskot um serstøk øki, har smáfiskur er, heldur enn generellar friðingar t.d. á øllum leiðum ein fjórðing úr landi.

Hetta upprit viðger tiltøk fyri at verja toskin á føroyska landgrunninum. Umframt ætlanirnar, ið vórðu lagdar fram á Ólavsøku, eru uppskot um at friða tvær leiðir – eina á Mýlingsgrunninum og eina eystur úr Fugloynni – sum bólkurin heldur eisini kunnu vera eitt íkast til at verja toskin.

2. TILTØK FYRI AT VERJA TOSKIN

Á Ólavsøku 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin er at seta í verk hesi tiltøk fyri at verja toskin:

2.1) Øll línuveiða verður bannað ein fjórðing úr landi í eitt ár. Bæði Fiskidaganevndin og Havstovan eru seinastu árini komin við tilmælum. Veiðibannið kann setast í verk sum ein broyting í kunngerð nr. 117/2005. Tó skal vera gjørt vart við, at ávísir løgfrøðiligir og tekniskir spurningar eru knýttir at hesi regulering. Ein av fyritreytunum, fyri at friðingin skal muna, er, at hon er galdandi fyri allan fiskiskap – bæði vinnuligan og til húsbrúks. Uttan at fara í smálutir, er ein spurningur, um tað yvirhøvur er heimild í lógini at seta bann fyri veiði til húsbrúks; lógin fevnir bert um vinnuligan fiskiskap. Ein annar trupulleiki er, at eitt bann av hesum slagi kann vera torført at hava eftirlit við og handhevja. Um tað kemur til skarpskeringar, kann tað t.d. vera ringt at prógva um ein útróðrarbátur í bólki 5, ið avreiðir, hevur roynt uttan fyri ella innan fyri ein fjórðing úr landi.

2.2) Markið hjá línuskipum verður flutt úr 6 fjórðingum út á 7,5 fjórðingar. Hetta uppskotið er sprottið úr tilmæli frá Fiskidaganevndini. Endamálið er at minka um royndina eftir toski. Tiltakið kann setast í verk sum ein broyting í kunngerð nr. 117/2005.

2.3) Meskavíddin í hjáveiðiposanum hjá trolbátunum, sum royna innan fyri 12 fjórðingar, verður hækkað úr 180 mm upp í 250 mm. Havstovan hevur mælt til hesa broyting seinastu

árini. Broytingin kann setast í verk við at broyta kunngerð nr. 32 frá 27.05.2004 um trolveiðu innan fyri 12 fjórðingar.

Umframt nevndu ætlanir kann toskurin á landgrunninum verjast við økisfriðingum. Bólkurin heldur, at tvær av teimum leiðum, sum Havstovan seinastu árini hevur mælt til at friða, kunnu umhugsast:

2.4) Friða øki á Mýlingsgrunninum. Endamálið er at verja gýtingar- og uppvakstrarøki hjá toski. Friðingin svarar til, at kassi 2 í gýtingarkunngerðini verður víðkaður inneftir - til eina linju drigna millum posisjónirnar 62°08'00"N 07°41'00"V og 62°22'00"N 07°19'00"V (sí viðløgdu kortskitsu). Kassi 2 er stongdur fyri øllum fiskiførum størri enn 80 tons, fiskifør uttan egningarmaskinu undantikin, frá 15/2 til 15/4.

Friðingin kann tí setast í verk sum ein broyting av gýtingarfriðingunum ella sum ein nýggj áseting í kunngerð nr. 117/2005.

Friðingin hevur týdning fyri gýtingina. Men leiðin er eisini uppvakstrarøki hjá toski, og um heystið er smáfiskur í økinum. Friðingin kann hava gagnliga ávirkan um várið (15/2 til 15/4), men hevur størst ávirkan, um hon er galdandi alt árið.

Friðingin kann koma at raka útróðrarbátar í bólki 4A og 4B, sum hava roynt nógv í økinum, eins og bátar í bólki 5.

2.5) Friða øki eystur úr Fugloynni. Endamálið er at verja uppvakstrarøkið hjá smáfiski/ungfiski. Friðingin kann setast í verk í serstakari kunngerð ella sum ein broyting í kunngerð nr. 117/2005:

"Allur fiskiskapur er bannaður á eini leið innan fyri linjur drignar millum hesi støð:
62°24'00"N 06°08'00"V
62°24'00"N 05°57'00"V
62°15'00"N 06°08'00"V
62°15'00"N 05°57'00"V
62°24'00"N 06°08'00"V"

Økið er uppvakstrarøki hjá toski. Friðingin hevur størst effekt, um hon er galdandi alt árið.

Friðingin kann koma at ávirka virksemið hjá útróðrarbátum í bólki 4A og 4B. Somuleiðis kann uppskotið raka trolbátarnar (4T), tí økið fellur saman við kassa A1 í kunngerðini um trolveiðu innan fyri 12 fjórðingar.

3. FYRITREYT

Tiltøkini, sum eru nevnd omanfyri, kunnu hava gagnliga ávirkan á toskastovnin, tí tey eru við til at verja smáa toskin. Fyritreytin, fyri at tiltøkini skulu gera mun, er tó, at tað eisini við øðrum fiskivinnupolitiskum atgerðum verður byrgt fyri, at royndin eftir toski gerst ov stór. Eitt nú er

hugsandi, at um meira verður til av toski seinni í ár ella komandi ár, so kann hetta vera við til at kveikja lív í nógvar av teimum fiskidøgum, sum hava ligið óbrúktir. Hetta kann føra við sær, at royndin eftir toski verður so stór, at gagnliga ávirkanin, sum tiltøkini, nevnd í hesum skjali, kunnu hava, kámast burtur. Ein máti at leggja upp fyri hesum er at inndraga óbrúktar fiskidagar í útróðrarflotanum.

Skjøl: Kortskitsa
Fundur um friðingar av økjum
Útbreiðsla av toski undir Føroyum
Tilmæli frá Havstovuni um økisfriðingar (juni 2009)

KORTSKITSA – uppskot til økisfriðingar - merktar við reyðum